Mars 2019

betri trygging

Tryggingartreytir

# *Innbústrygging*

# Innbústrygging


## A. Lógargrundarlag 4

## B. Felagstreytir 4

10.00 Hvør er tryggjaður? 4
11.00 Eigaraskifti 5
12.00 Tryggingarstaður 5

## C. Tryggjaðir lutir 5

13.00 Tryggingin fevnir um 5
13.20 Innbúgv og persónligt leysafæ 5
13.21 Vanligt innbúgv 5
13.22 Serligt innbúgv 5
13.30 Aðrir lutir 6
13.35 Smáir róðrarbátar v.m. 6
13.40 Húsdýr 6
13.45 Prutl 6
13.50 Súkklur 6
13.55 Ferðagóðs 7
13.60 Bygningslutir 7
14.00 1. Risikotryggingar 7
14.05 Gull o.tl. 7
14.10 Peningur o.tl. 7
14.15 Frímerkja- og myntsøvn v.m. 7
14.20 Løntakaraamboð 7
14.25 Vørur í køli- og frystiskápum 7
15.00 Antennur til privata nýtslu 8

## D. Skaðaorsøkir 8

20.00 Eldur 8
21.00 Tilsóting 8
23.00 Eksplosjón 8
25.00 Beinleiðis torusláttur 8
26.00 Niðurdottin flogfør 8
27.00 Fylgiútreiðslur 9
30.00 Útstreyming og seyring 9
50.00 Stormur 9
60.00 Omanlop, áarlo p og glopraregn/toybil 9
65.00 Ferðsluóhapp 10
70.00 Innbrotstjóvarí 10
72.00 Vanligt tjóvarí 10
73.00 Herverk 10
74.00 Rán 12
76.00 Álop 12
77.00 Tjóvarí av súkklum 12
79.00 Vatnskaði á lutir hjá leigarum 12

## E. Felagstreytir fyri C og D 13

80.00 Upprudding 13
81.00 Fylgiskaði av avfalli 13
82.00 Fylgiskaði av bygningsskaða 13
83.00 Fylgiskaði av øðrum brádliga virkandi skaða 13
90.00 Skaðauppgerð 13
98.00 Skjalprógv 14
100.00 Tryggingarvirði 14
110.00 Yvirtrygging 14
120.00 Undirtrygging 14
130.00 Endurgjald 14
140.00 Kontant endurgjald 15

## F. Tilvalstryggingar 15

150.00 Tøknitrygging 15
160.00 Brádligur skaði 15
170.00 El-skaðatrygging 16

## G. Serstakar tryggingar 16

180.00 Glastrygging 16
190.00 Kummutrygging 17
200.00 Endurhýsing og meirútreiðslur 17
201.00 Privat ábyrgdartrygging 18
202.00 Gestaboð 19
205.00 Rættarhjálp 20

## H. Vanligar reglur 20

220.00 Tryggingargjøld v.m. 20
221.00 Sjálvsábyrgd 20
222.00 Prístalsjavning 21
230.00 Tíðarskeið og uppsøgn 21
235.00 Angringarrættur 21

# Innbústrygging


| | | |
|---|---|---|
| 240.00 | Uppsøgn aftaná skaða | 21 |
| 250.00 | Broyting av gjaldskránni og tryggingartreytunum | 21 |
| 260.00 | Tá tryggingin verður teknað | 21 |
| 270.00 | Vandabroytingar og flyting | 21 |
| 290.00 | Trygdarásetingar | 22 |
| 300.00 | Kríggj, náttúruvanlukkur o.tl. | 22 |
| 310.00 | Viðlíkahald v.m. | 22 |
| 320.00 | Eftirlit | 22 |
| 330.00 | Skaði, sum tann tryggjaði er atvoldin til við vilja ella í gáloysni | 22 |
| 340.00 | Dupulttrygging | 23 |
| 350.00 | Hvussu verður boðað frá skaða? | 23 |
| 360.00 | Bjarging og varðveitsla | 23 |
| 370.00 | Ósemjur | 23 |
| 371.00 | Innanhýsis kæruviðgerð | 23 |
| 372.00 | Kærunevndin | 24 |
| 373.00 | Yvirsýn | 24 |

# Innbústrygging

## Soleiðis verða treytirnar nýttar

Tað er týdningarmikið, at tey tryggjaðu vita, hvat trygging teirra fevnir um, bæði í tí dagliga og – ikki minst – tá ið skaði hendir. Vit kunnu tí bert viðmæla, at roynt verður at lesa hesar tryggingartreytir.

Niðanfyri er tí ein lítil vegleiðing í, hvussu treytirnar í høvuðs-heitum eru uppbygdar.

Um skaði skuldi hent ella tú hevur hug at kunna teg um grundarlagið fyri tryggingaravtaluni verður farið fram á henda hátt.

Deild A greiðir frá, hvørjar lógir og reglur eru grundarlag fyri tryggingaravtaluni.

Deild B umrøður hvørjir persónar eru tryggjaðir sambært tryggingaravtaluni, umframt hvar tryggingarstaðurin er.

Í Deild C sæst, um luturin er umfataður av tryggingini. Í rútinum har luturin er nevndur, eru eisini nevndar tær skaðaorsøkir, ið tryggingin fevnir um, og hvar í Deild D lesast kann meira um tær. Viðvíkjandi innbrotstjóvaríi, vanligum tjóvaríi og herverki, hygg í endurgjaldsyvirlitið á s. 11.

Tær felagstreytir, ið eru galdandi fyri Deildirnar C og D, eru umrøddar í Deild E.

Deild F fevnir um tilvalstryggingar. Hesar tryggingar eru bert galdandi, um tær eru nevndar í tryggingarskjalinum.

Undir Deild G eru umrøddar tryggingar, ið hava reglur fyri seg, t.d. privat ábyrgdartrygging.

Í Deild H eru samlaðar vanligar reglur, ið eru galdandi fyri alla tryggingina. Umrødd verða tryggingargjøld, uppsagnarfreistir v.m.

Væl vitandi, at tað er trupult at lesa tryggingartreytir, eru starvsfólk okkara tær til hjálpar og vegleiðing, um trupulleikar skuldu verið við at skilja partar av tryggingartreytunum.

## A. Lógargrundarlag

Fyri tryggingina eru galdandi, umframt hesar tryggingartreytir, møguligar sertreytir í tryggingarskjalinum og viðtøkur felagsins, tær í Føroyum galdandi lógir um tryggingaravtalur og tryggingarvirksemi.

## B. Felagstreytir

### 10.00 Hvør er tryggjaður?

**10.01** Tryggingin fevnir um tryggingartakaran við húski og fastbúgvandi medhjálp.
Tryggingartakarin er tann, ið hevur teknað tryggingina.

**10.02** Teir persónar, ið tryggingin fevnir um, verða nevndir teir tryggjaðu. Við húski er at skilja: Húsfólk, herundir fosturbørn, ið búgva hjá tryggingartakaranum. Heruppí eru at rokna eisini persónar, ið liva í føstum paralag við tryggingartakaranum og/ella heimabúgvandi børnum teirra.

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Tryggingin fevnir bert um hesar persónar, um teir eru tilmeldaðir fólkayvirlitinum at hava fastan bústað á sama stað sum tryggingartakarin.
**2.** Tryggingin fevnir ikki um leigarar ella persónar, ið bert gista hjá tryggingartakaranum.

**10.03** Ógift børn undir 21 ár, sum ikki búgva heima.

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Tað er tó ein treyt, at tey búgva einsamøll og ikki hava fastbúgvandi børn hjá sær.

**10.04** Búfelagsskapur við í mesta lagi tveimum persónum er at rokna sum fast paralag.

**10.05** Um so er, at rætturin til endurgjald fellur burtur orsakað av broytingum í omanfyri nevndu viðurskiftum, er viðkomandi kortini tryggjaður, til onnur trygging er teknað, tó í longsta lagi 3 mánaðir.

**10.06** Tryggingin fevnir eisini um medhjálp, ið ikki er fastbúgvandi, tá talan er um ábyrgd fyri skaðar, sum standast í sambandi við húshaldið.

# Innbústrygging

## 11.00 Eigaraskifti

**11.01** Fer eigaraskifti fram, skal Betri Trygging hava skrivlig boð um hetta beinanvegin.

**11.02** Tann nýggi eigarin er tryggjaður, til nýggj trygging er teknað, tó í longsta lagi 4 vikur frá yvirtøkudegi. Er nevnda fráboðan ikki latin innan nevndu freist, er tryggingin burturdottin.

## 12.00 Tryggingarstaður

**12.01** Tryggingin av innbúgvi fevnir um egnar lutir í Føroyum:

**a)** á tí tryggingarstaði, sum nevndur er í tryggingarskjalinum (matr. nr., luta nr. ella brúks nr.),

**b)** fyribils – tó í longsta lagi 12 mánaðir – uttanfyri tryggingarstaðin,

**c)** í kundaboksum í peningastovnum,

**d)** í goymslurúmi, flutningsbili ella bingju,

**e)** undir flyting til nýggjan heilársbústað. Tryggingin er galdandi í gamla og nýggja heilársbústaðnum í upp til 3 mánaðir eftir at flytingin er byrjað. Sí § 270.01 e,

**f)** uttanfyri tryggingarstaðið, ið tryggingartakarin hevur ognað sær og ætlar at hava á tryggingarstaðnum,

**g)** uttanfyri tryggingarstaðið – tó í longsta lagi 3 mánaðir – um tryggingartakarin ætlar at selja teir.

**12.02** Verða tryggjaðir lutir tiknir við úr heilársbúðstaðnum til frítíðarhús, húsvogn, tjald ella stuttleikabát, fevnir tryggingin bert um teir, so leingi tann tryggjaði býr har – tað er at skilja so, at hann gistir har um náttina.

**12.03** Kemur tann tryggjaði bert hagar at gista um vikuskiftið, verður tað ikki at roknað sum, at hann býr har.

**12.04** Tryggingin fevnir kortini um tryggjaðar lutir, ið eru havdir við úr tryggingarstaðnum í frítíðarhús ella húsvogn í tíðarbilinum 01/06 til 31/08, báðir dagar íroknaðir, sjálvt um húsini/húsvognurin standa mannleys.

**12.05** Tá talan er um vanligt innbúgv, sí § 13.21, ið fyribils verður havt við í frítíðarhúsið ella húsvognin fevnir tryggingin tó um hetta alt árið, hóast tryggingartakarin ikki býr har.

**12.06** Ferðagóðstryggingin fevnir um egnar lutir, sum verða tiknir við ella sendir sum ferðagóðs á ferðum uttanlands upp til 3 mánaðir.

**12.07** Ábyrgdartryggingin og rættarhjálpartryggingin fevna um í Føroyum og á ferðum uttanlands upp til 3 mánaðir.

# C. Tryggjaðir lutir

Tryggingin fevnir um innbúgv og persónligt leysafæ, ið nevnt er niðanfyri, og sum:

**a)** tey tryggjaðu eiga,

**b)** tey tryggjaðu bera ábyrgdina av við láni ella leigu. Sama er galdandi fyri lutir, keyptir við avgjaldsskipan. Tryggingin fevnir um læntar og leigaðar lutir á sama hátt sum egnar lutir, men bert í tann mun, eigarin ikki hevur teknað trygging.

## 13.00 Tryggingin fevnir um

**Niðanfyri nevndu lutir eru tryggjaðir ímóti skaða av:**

| | |
|---|---|
| Eldi | §§ 20.00-27.00 |
| Útstreyming av vatni, olju, køliløgi, dampi o.tl. | § 30.00 |
| Stormi | § 50.00 |
| Omanlopi | § 60.01 |
| Áarlopi | § 60.02 |
| Glopraregni/toybili | § 60.03 |
| Ferðsluóhappi | § 65.00 |
| Innbrotstjóvaríi | § 70.00 |
| Vanligum stuldri | § 72.00 |
| Herverki | § 73.00 |
| Ráni | § 74.00 |
| Álopi | § 76.00 |

**13.20** Innbúgv og persónligt leysafæ, sum er í vanligum húsarhaldum:

# Innbústrygging

**13.21** Vanligt innbúgv, so sum:
Klæðir, barnavognar, barnastólar, koyristólar, súkklur (sí tó § 13.50), urtagarðsamboð, vanlig amboð til privata nýtslu og brenni. Matvørur, herundir kjøt í hjalli upp til ta nøgd, sum skattamyndugleikarnir góðkenna uttan roknskaparskyldu. Elektrisk húsarhaldstól so sum køliskáp, frystibox, komfýrur, vaski- og uppvaskimaskina, turkimaskina í tann mun, sum onnur trygging ikki fevnir um tey (Sí tó § 14.25 Vørur í køli- og frystiskápum). Reiðskapur, vanligur fiskireiðskapur, so sum tráður, snøri, línur, stampar, hondsnellur, grindareiðskapur, vápn o.tl.

**13.22** Serligt innbúgv, so sum:
Antikvitetir, málningar, listaverk, ektaði teppi, ur, myndatól og framvísarar við tilhoyri, kikarar, tónleikatól, styrkjarar, hátalaraútbúnað, fløgu- og plátuspælarar, her íroknað fløgur og plátur, radio, sjónvarp, videotól við tilhoyri, videobond, samtalutól, fartelefon við tilhoyri, teldlar við tilhoyri, teldur við tilhoyri, telefax, fotokopimaskinur til privata nýtslu, loðskinn og rúsdrekka. Endaliga avmonterað biltilhoyr og biltilhoyr, ið enn ikki er monterað á privat bilar hjá teim tryggjaðu. (T.v.s. ikki tilhoyr, ið ein bilskrokktrygging fevnir um. Tað er ikki avgerandi, um bilskrokktrygging er teknað ella ikki).

**13.30 Aðrir lutir**

**Niðanfyri nevndu lutir eru tryggjaðir ímóti skaða av:**

| | |
|---|---|
| Eldi | §§ 20.00-27.00 |
| Omanlopi | § 60.01 |
| Áarlopi | § 60.02 |
| Innbrotstjóvarí | § 70.00 |
| Vanligum stuldri | § 72.00 |
| Herverki | § 73.00 |
| Ráni | § 74.00 |

**13.35** Smáir róðrarbátar v.m.
Smáir róðrarbátar (jollir), kanoir og kajakkir, brimfjalir við tilhoyri, (leysamotorar, tó í mesta lagi 5hk.)

**Niðanfyri nevndu lutir eru tryggjaðir ímóti skaða av:**

| | |
|---|---|
| Eldi | §§ 20.00-27.00 |
| Omanlopi | § 60.01 |
| Áarlopi | § 60.02 |
| Innbrotstjóvarí | § 70.00 |
| Ráni | § 74.00 |

**13.40 Húsdýr**
Vanlig húsdýr, ið ikki eru til vinnulig endamál.

**Niðanfyri nevndu lutir eru tryggjaðir ímóti skaða av:**

| | |
|---|---|
| Eldi | § 20.00 |
| Eksplosjón | § 23.00 |
| Omanlopi | § 60.01 |
| Áarlopi | § 60.02 |

**13.45 Prutl**
Prutl og lutir til hesi.

**Niðanfyri nevndu lutir eru tryggjaðir ímóti skaða av:**

| | |
|---|---|
| Eldi | §§ 20.00-27.00 |
| Útstreyming av vatni, olju, køliløgi, dampi o.tl. | § 30.00 |
| Stormi | § 50.00 |
| Omanlopi | § 60.01 |
| Áarlopi | § 60.02 |
| Innbrotstjóvarí | § 70.00 |
| Ráni | § 74.00 |
| Súkklustuldri | § 77.00 |

**13.50 Súkklur**
Súkklur, við hjóltvørmáti størri enn 12 tummar og eru ætlaðar vaksnum. Súkklur við hjóltvørmáti undir 12 tummar og eru ætlaðar børnum, eru at meta sum vanligt innbúgv (sí § 13.21).

**Niðanfyri nevndu lutir eru tryggjaðir ímóti skaða av:**

| | |
|---|---|
| Eldi | §§ 20.00-27.00 |
| Útstreyming av vatni, olju, køliløgi, dampi o.tl. | § 30.00 |
| Stormi | § 50.00 |
| Omanlopi | § 60.01 |
| Áarlopi | § 60.02 |
| Glopraregni/toybili | § 60.03 |
| Ferðsluóhappi | § 65.00 |
| Innbrotstjóvarí | § 70.00 |
| Vanligum stuldri | § 72.00 |
| Herverki | § 73.00 |
| Ráni | § 74.00 |

Tryggingin fevnir eisini um ferðagóðs, ið kemur í bland ella verður skatt.

# Innbústrygging

Harumframt fevnir tryggingin um innskrivað ferðagóðs, ið verður sent við flogfari, skipi, toki ella fraktmanni, um tað verður burtur og ikki kemur aftur í aftur. Hetta er galdandi annaðhvørt móttøkustaðurin er í Føroyum ella uttanlands.

Tryggingin fevnir um ferðagóðs – burtursæð frá § 14.05 Gull o.tl., § 14.10 Peningur o.tl. og § 14.15 Frímerkja- og myntsøvn v.m. – sum verður havt við á bussferðum uttanlands og goymt í serligum viðførisrúmi í einum bussi, um tað verður burtur og ikki kemur aftur í aftur. Tað er ein treyt, at bussferðin er ein liður í sjálvari ferðini (t.v.s. at tryggingin t.d. ikki fevnir um skaða á útferðum á frítíðarstaðnum), og at hon er keypt frá ferðamannastovu ella ferðasmiði.

**13.55 Ferðagóðs**
Ferðagóðs er innbúgv og aðrir persónligir ognarlutir, ið verða sendir ella havdir við uttanlands.

Tryggingin fevnir um ferðagóðs á ferðum uttanlands í upp til 3 mánaðir.

Verður stolið frá tryggingartakaranum uttanlands, eigur at boðast frá til løgregluna á staðnum. Váttan um hesa fráboðan skal sendast Betri Trygging.

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Tryggingin fevnir ikki um skaðar, ið standast av, at illa er innballað ella av, at løgur, ið tryggingartakarin hevur við, lekur út, ella at kuffert og annað viðføri fáa snuddir, ið vanliga kunnu koma á ferðagóðs og viðføri.

**2.** Tryggingin fevnir ikki um tap ella útreiðslur av, at ferðagóðs ikki er framkomið rættstundis.

**3.** Tryggingin fevnir ikki um ferðagóðs á ferðum í Føroyum.

**4.** Tryggingin veitir ikki endurgjald fyri skaðar, ið onnur trygging fevnir um.

**Niðanfyri nevndu lutir eru tryggjaðir ímóti skaða av:**

| | |
|---|---|
| Innbrotstjóvaríi | § 70.00 |
| Vanligum stuldri | § 72.00 |
| Herverki | § 73.00 |

**13.60 Bygningslutir**
Bygningslutir, ið hin tryggjaði sum leigari hevur viðlíkahalds-skyldu av, um so er, at bygningstryggingin ikki fevnir um hetta.

## 14.00 1. Risikotryggingar

Við 1. risikotrygging er at skilja, at fult endurgjald verður veitt upp til niðanfyri nevndu prosentásetingar, t.v.s., at undirtrygging ikki verður gjørd galdandi fyri hesar lutir, hóast innbúgvið er undirtryggjað.

Endurgjaldið kann tó ikki vera meira enn avtalaðu prosentásetingarnar.

Um tryggingartakarin vil hava hægri prosentásetingar, kann avtala gerast við felagið um hetta.

**Niðanfyri nevndu lutir eru tryggjaðir ímóti skaða av:**

| | |
|---|---|
| Eldi | §§ 20.00-27.00 |
| Útstreyming av vatni, olju, køliløgi, dampi o.tl. | § 30.00 |
| Stormi | § 50.00 |
| Omanlopi | § 60.01 |
| Áarlopi | § 60.02 |
| Glopraregni/toybili | § 60.03 |
| Ferðsluóhappi | § 65.00 |
| Innbrotstjóvaríi | § 70.00 |
| Ráni | § 74.00 |

**14.05 Gull o.tl.**
Gull, silvur, platin, perlur, gimsteinar og skartgripir. Upp til 10% av tryggingarhæddini fyri innbúgv.

**14.10 Peningur o.tl.**
Peningur, virðisskjøl, sum t.d. premiuobligatiónir, óbrúkt frímerki og myntkort. Upp til 2% av tryggingarhæddini fyri innbúgv.

**14.15 Frímerkja- og myntsøvn v.m.**
Upp til 5% av tryggingarhæddini fyri innbúgv.

**14.20 Løntakaraamboð**
Amboð, neyðug útgerð og tól, sum hin tryggjaði eigur, og sum lønmóttakari nýtir í starvi sínum. Upp til 5% av tryggingarhæddini fyri innbúgv.

# Innbústrygging

**Niðanfyri nevndu lutir eru umframt tryggjaðir ímóti skaða av tilvildarligum svíki við streyminum:**

**14.25 Vørur í køli- og frystiskápum**
Vørur í køliskápum og frystiskápum/-boksum. Upp til 2% av tryggingarhæddini fyri innbúgv.

**14.26** Tryggingin fevnir eisini um fylgiskaða á køli- og frystiútbúnaðin umframt bygnings- og innbússkaða, orsakað av teim oyðiløgdu vørunum. Tryggingin fevnir um skaðar, ið standast av tilvildarligum svíki við streyminum, t.d. orsakað av skammlopi.

**14.27** Er skaðin á vørurnar hendur orsakað av el-skaða, verður skaðin á køli- og frystiútbúnaðin endurgoldin sambært reglum í §§ 170.02 og 170.03. Hetta er galdandi uttan mun til um El-skaðatrygging er teknað ella ikki.

**Undantøk og avmarkingar**
1. Tryggingin fevnir ikki um skaða, um so er, at tey tryggjaðu hava brotið streymin av, ella tað snýr seg um skaða, ið kemur undir seljarans ábyrgdartrygd.

2. Tryggingin fevnir ikki um skaða, sum stendst av sliti, tørvandi viðlíkahaldi, skeivari uppseting ella skeivari tilrættarlegging.

## 15.00 Antennur til privata nýtslu
Fyri antennur kann serstøk trygging teknast.
(Um bygningstryggingin ikki fevnir um hesar).

## D. Skaðaorsøkir

**Hvørjar skaðaorsøkir fevnir tryggingin um?**
Tryggingin fevnir um beinleiðis skaða á teir tryggjaðu lutirnar, ið stendst av eini skaðaorsøk, ið tryggingin fevnir um.

## 20.00 Eldur
Tryggingin fevnir um skaða av eldi. Við eld er at skilja opin, logandi eldur, sum kann breiða seg av sær sjálvum. Sí tryggingaravtalulógina §§ 79-82.

**20.01 Eldimpregnerað innbúgv**
Smelting av eldimpregneraðum innbúgvi.

**20.02** Klæði í heilautomatiskum vaskimaskinum og turkimaskinum.Tryggingin fevnir um skaða á klæðir til vaskingar/turkingar í heilautomatiskum vaskimaskinum og turkimaskinum, orsakað av:

1. Eldi, svíðing, smelting ella koling, tá skaðin er hendur av mekaniskum ella tekniskum breki.
2. Turrkóking. Við turrkóking verða allir skaðar endurgoldnir.
3. Mekaniskum ella tekniskum breki. Um tryggjaði sambært umvælingarrokning kann skjalprógva, at talan var um brek við tólinum, verður ein og hvør skaði á klæðini endurgoldin um tólið ikki er eldri enn 10 ára gamalt.

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Endurgjald fæst ikki fyri skaða, ið stendst av, at lutir svíðast ella smelta, og sum ikki er ein fylgja av eldi, til dømis av stikkloga frá el-innleggingum ella -tólum, glóðum frá opnum eldstøðum ella tubbaksneistum og sigarettglóðum. Sí tó §§ 20.01 og 20.02.

**2.** Tryggingin veitir ikki endurgjald fyri skaða á lutir, sum við vilja útsetast fyri eld ella hita, hóast eldur kemur í teir. Sí tó § 20.02.

**3.** Viðv. § 20.02. Tryggingin fevnir ikki um skaða orsakað av at skaddu lutirnir eru vaskaðir ella turkaðir við ov høgum hita.

## 21.00 Tilsóting
Tryggingin fevnir um skaða, ið stendst av brádligari tilsóting frá útgerð til upphiting, t.d. oljufýrum.

**Undantøk og avmarkingar**
1. Tað er ein treyt, at vegleiðingin frá framleiðaranum er fylgd, og at almennar fyriskipanir eru hildnar.

## 23.00 Eksplosjón
Tryggingin fevnir um skaða av eksplosjón. Ein eksplosjón er ein sera skjótt fyrigangandi eldur (brenning) ella evnafrøðilig tilgongd, ið elvir nógvan hita, og sum oftast er beint aftaná ein brestur og eitt ljós.

# Innbústrygging

## 25.00 Beinleiðis toruslættur

Tryggingin fevnir um skaða, sum er ein fylgja av beinleiðis toruslættri. Tá talan er um, at toran hevur sligið beinleiðis niður, er einans at skilja, tá tað á tryggingarstaðnum kann sláast fast, at skaðin er ein beinleiðis fylgja av streymi ella hita frá toruslættri.

## 26.00 Niðurdottin flogfør

Tryggingin fevnir um skaða av niðurdotnum flogførum ella lutum, ið detta niður frá flogførum, annaðhvørt tað er partur av flogfarinum ella lutum, ið flogfarið førir sum last ella ferðagóðs.

## 27.00 Fylgiútreiðslur

Somuleiðis fevnir tryggingin um skaða, ið stendst av sløkkivatni, royki og sóti (frá eldi). Sí annars §§ 80.00, 81.00 og 360.00.

## 30.00 Útstreyming og seyring

**30.01** Útstreyming av vatni, olju, køliløgi, dampi o.tl. Tryggingin fevnir um skaða av brádliga og tilvildarliga útstreymandi (t.v.s. ikki dryppandi ella spakuliga seyrandi, sí tó § 79.00 Vatnskaði á lutir hjá leigarum) vatni, olju, køliløgi, dampi o.tl. úr rørútbúnaði og innleggingum, ið harí eru festar, her íroknað køli- og frystiútbúnaði, somuleiðis frá vatn-sengrum, fiskabúrum og øðrum tangum 20 litrar ella meira.

**30.02 Seyring**

Tryggingin fevnir um skaðar, sum standast av lekum í fjaldum rørum og leiðingum.

**30.03** Tað at rør og leiðingar eru fjald, merkir, at tey eru stoypt inn í ella fjald í gólvi, kanalum, krúpikjallarum og undir væðingum.

**Undantøk og avmarkingar**

**1.** Vatnskaði, sum stendst av frostspreinging í rúmum, ið ikki eru nóg væl upphitað, verður bert goldin, um upphitingin av tilvild hevur svikið.

**2.** Tryggingin fevnir ikki um skaða, ið stendst av áfylling ella tøming av oljutanga ella øðrum tangum.

**3.** Tryggingin fevnir ikki um skaða av grund- ella kloakkvatni, sum stígur upp, heldur ikki skaða av vatni úr takrennum og rennistokkum frá takrennum, avfalli ella flóð.

**4.** Omanfyri nevndu undantøk eru ikki galdandi fyri skaðar frá hølum, ið tey tryggjaðu ikki hava atgongd til. Sama er galdandi um skaðin hendi orsakað av umstøðum, ið tey tryggjaðu ikki høvdu ávirkan á.

**5.** Tað verður gjørt vart við, at rør og slangur í vaski-, uppvaski-, turkimaskinum og frystiboksum v.m. eru ikki at meta sum fjald rør.

## 50.00 Stormur

**50.01** Við storm er at skilja vindur, har vindmegin áhaldandi ella í hvirlum er minst 17,2 m/sek.

**50.02** Tryggingin fevnir um brádligan skaða av stormi og meldurródn og skaða av avfalli í sambandi við skaða av hesum.

**50.03** Tryggingin fevnir bert um skaða av avfalli, um skaðin hevur beinleiðis samband við og hendir beint aftaná, at bygningurin ella yvirbreiðingartilfar, ið er rætt fest, fær stormskaða. Sí tó § 79.00 Vatnskaði á lutir hjá leigarum.

**50.04** Tað er ein treyt, at tað uttaná bygninginum ella yvirbreiðingartilfarinum kann ávísast skaði, sum hendur er av stormi ella meldurródn, og at skaðin á tryggjaðu lutirnar kann prógvast at stava frá hesum.

**Undantøk og avmarkingar**

**1.** Tryggingin fevnir ikki um skaða av uppgangi, stormflóð, brimi ella flóð.

**2.** Tryggingin fevnir ikki um skaðar á lutir uttandura.

## 60.00 Omanlop, áarlop og glopraregn/toybil

**60.01 Omanlop**

Tryggingin fevnir um skaða av omanlopi. Við omanlop er at skilja: Grót, ið rapar oman úr homrum, líðum og brekkum. Harumframt fevnir tryggingin um skriðulop og skalvalop.

**Undantøk og avmarkingar**

**1.** Tað er ein treyt, at tað uttaná bygninginum kann ávísast skaði, sum hendur er av omanlopi, og at skaðin á teir tryggjaðu lutirnar kann prógvast at stava frá hesum.

# Innbústrygging

**60.02 Áarlop**
Tryggingin fevnir um skaða av áarlopi. Við áarlop er at skilja: Tá áir leypa, annaðhvørt orsakað av toybili ella av, at nógv avfall er, og vatn, runa og eyrur rakar ta tryggjaðu ognina.

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Tryggingin góðgerð ikki skaða, sum stendst av vatni frá veitum, tjørnum og vøtnum.

**60.03 Glopraregn/toybil**
Tryggingin fevnir um skaða, ið kemst á, tá glopraregn er, ella tá av mesta toybili er, og vatnið ikki á vanligan hátt rennur frá, og tessvegna floymur yvir tryggingarstaðið frá tekju, jørðildi ella altani ella stígur upp ígjøgnum frárenningarrørini.

**Undantøk** og avmarkingar
**1.** Tryggingin fevnir ikki um skaða av vatni ella avfalli, sum lekur inn gjøgnum takið ella rivur og op yvir jørðildi. Sí tó § 79.00 Vatnskaði á lutir hjá leigarum.

**2.** Tryggingin fevnir ikki um skaðar á lutir uttandura.

## 65.00 Ferðsluóhapp
Tryggingin fevnir um skaða á tryggjaðar lutir orsakað av ferðsluóhappi har í minsta lagi eitt ferðslufar er uppi í. Við ferðsluóhapp skilst ákoyring, samanstoytur v.m.

**Við ferðslufar er at skilja:**

1. Motordrivin akfør, ið ferðslulógin fevnir um. T.d. bilar, prutl, motorsúkklur og traktorar.
2. Súkklur við tveimum hjólum við hjóltvørmáti yvir 12 tummar.
3. Súkklur við tveimum ella trimum hjólum og við grindnummari.
4. Hestavognar.
5. Onnur almenn ferðslufør.
6. Avlamisakfør.
7. Skip og bátar.
8. Flogfør og tyrlur.

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Tryggingin fevnir ikki um skaða á flytigóðs ella aðrar lutir, ið eru latnir til flytingar ímóti gjaldi.

**2.** Tryggingin fevnir ikki um skaða á ferðslufarið.

**3.** Tryggingin fevnir ikki um skaða á dýr.

## 70.00 Innbrotstjóvarí
**70.01** Tryggingin fevnir um skaða av innbrotstjóvarii úr forsvarliga avlæstum bygningum ella rúmum.

**70.02** Við innbrotstjóvarí er at skilja, tá ið tjóvurin:
**a)** Við makt brýtur sær veg inn í bygning ella forsvarliga avlæst rúm, ella
**b)** við følskum ella stolnum lyklum læsir seg inn í forsvarliga avlæst rúm, ella
**c)** tekur seg inn ígjøgnum op, ið ikki eru ætlað til inngongd.

**70.03** Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at hurðar og onnur op eru forsvarliga avlæst, og at vindeygu, burtursæð frá upplating til neyðugt luftskifti, eru afturlatin, og at vindeygu, har undirkarmurin er nærri lendi, trappu, platti, hálvtaki, svala, byggipalli ella tílíkum enn 2 m, skulu vera afturlatin og krampað, tá eingin er inni.

## 72.00 Vanligt tjóvarí
Tryggingin fevnir um vanligt tjóvarí.

## 73.00 Herverk
Tryggingin fevnir um skaða av herverki. Við herverk er at skilja, skaði voldur við vilja og við illgerð í huga.

**Viðvíkjandi endurgjaldi fyri skaðar í sambandi við:**

| | |
|---|---|
| Innbrotstjóvarí | § 70.00 |
| Vanligt tjóvarí | § 72.00 |
| Herverk | § 73.00 |

Sí endurgjaldsyvirlitið á næstu síðu.

**Endurgjaldsyvirlitið skal lesast á henda hátt:**
Fyrst verður lisið í 1. teigi “Tryggjaðir lutir”. Tá ið funnið er út av, í hvørjum bólki luturin hoyrir heima, verður farið út eftir teigunum 2 til 10. Har teigarnir møtast, sæst hvussu endurgjald verður veitt fyri lutin.

# Innbústrygging

**1.** Har, ið "+" stendur í einum rúti verður veitt fult endurgjald.
**2.** Har, ið "%" stendur í einum rúti, verður veitt endurgjald upp til %-markið. Prosentini verða roknað av tí í tryggingarskjalinum nevndu tryggingarhædd fyri innbúgvið.
**3.** Har, ið "-" stendur í einum rúti, verður einki endurgjald veitt.
**4.** Fyri súkklur eru serligar reglur galdandi fyri vanligt tjóvarí og herverk. Sí § 77.00.

Undantøkini í breiðu teigunum í neðra á yvirlitinum eru galdandi fyri rútarnar, ið liggja omanfyri.

## Endurgjaldsyvirlit

| 1.<br>Tryggjaðir lutir | 2.<br>Innbrotstjóvarí úr forsvarliga læstum bygningi ella rúmi | 3.<br>Innbrotstjóvarí úr lofts- og kjallara-rúmum í íbúðarblokk-um, úr úthús-um og bilhúsum | 4.<br>Vanligt tjóvarí úr ólæstum bygningi, rúmi ella úti | 5.<br>Vanligt tjóvarí úr lofts- og kjallararúmum í íbúðar-blokkum, úr úthúsum og bilhúsum | 6.<br>Vanligt tjóvarí úr læstum bil-um, privatum sjógangandi førum og flogførum. Tjøldum, ið fólk býr í | 7.<br>Vanligt tjóvarí uttaná bilum | 8.<br>Herverk í bygningum | 9.<br>Herverk í lofts- og kjallararúmum í íbúðar-blokkum, í úthúsum og bilhúsum | 10.<br>Herverk úti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| § 13.21<br>Vanligt innbúgv | + | 5% | + | 2% | + | 2% | + | + | + |
| § 13.22<br>Serligt innbúgv | + | - | 10% | - | 5% | - | + | + | - |
| § 14.05<br>Gull o.tl. | 10% | - | - | - | - | - | 10% | - | - |
| § 14.10<br>Pengar o.tl. | 2% | - | - | - | - | - | 2% | - | - |
| § 14.15<br>Frímerkja- og myntsøvn v.m. | 5% | - | - | - | - | - | 5% | - | - |
| § 14.20<br>Løntakara-amboð (tó ikki úr arbeiðs-skúrum) | 5% | 5% | - | - | - | - | 5% | - | - |
| § 13.35 Smáir róðrar-bátar v.m. | + | + | + | + | + | - | + | + | - |
| § 13.40<br>Húsdýr | + | + | - | - | - | - | + | + | + |
| § 13.50<br>Súkklur | + | + | Viðvíkjandi endurgjaldi sí § 77.00 | | | | Viðvíkjandi endurgjaldi sí § 77.00 | | |
| § 13.60<br>Bygningslutir | + | + | + | + | | | + | + | + |
| Undantøk og avmark-ingar | Tryggingin fevnir ikki um:<br>1. innbrotstjóvarí úr bústaði, ið hevur staðið mannleysur í meira enn 6 mánaðir.<br>2. innbrotstjóvarí úr rúmum á gistingarhúsum, rúmum í jarn-breytarvognum ella kømrum á ferðaskipum uttan so er, at spor síggjast, at tað er brotið upp við makt. | | Tryggingin fevnir ikki um:<br>1. lutir, ið eru mistir, gloymdir ella vorðnir burtur.<br>2. tjóvarí úr bústaði, ið stendur mannleysur, útlæntur ella útleigaður.<br>3. um hin tryggjaði hevur farið fram við skilaleysum gáloysni.<br>4. tjóvarí, ið framt er av einum tryggjaðum, meðhjálp ella fólki, ið gista hjá honum og líkastillaðum við hesi.<br>5. tjóvarí av lutum í læstum bilum, privatum sjógangandi førum og flogførum. Tjøldum, ið fólk býr í, uttan so er, at spor síggjast, at tað er brotið upp við makt.<br>6. lutir í bilum, um hesir vóru sjónligir uttanífrá. | | | | Tryggingin fevnir ikki um:<br>1. herverk í bústaði, ið hevur staðið mannleysur í meira enn 6 mánaðir.<br>2. skaða á lutir, ið liggja uttandura aðrastaðni enn har, hin tryggjaði hevur heilársbústað, tó fevnir tryggingin um vanligt og serligt innbúgv undir flyting.<br>3. skaðar, ið voldast av tí tryggjaða ella persónum, ið hava lógligan rætt at koma inn á persónligu ogn hins tryggjaða. | | |

# Innbústrygging

## 74.00 Rán

**1.** Tjóvarí, ið verður framt í nánd av hinum tryggjaða uttan at nýta vald, og sum fólk varnast, tá ið tað fer fram. Róp skal gerast í somu løtu, sum hendingin fer fram ella skal tjóvaríið verða váttað av onkrum øðrum hjástøddum.

**2.** Tjóvarí framt við valdi ella við hóttan um at nýta vald við tað sama.

## 76.00 Álop

Tryggingin fevnir um skaðar á tryggjaðar lutir orsakað av, at ein av teimum tryggjaðu verður álopin.

## 77.00 Tjóvarí av súkklum

**77.01** Tjóvarí av súkklum, ið eru læstar við góðkendum lási. Kravið um góðkent lás er ikki galdandi fyri barnasúkklur. Við barnasúkklur er at skilja súkklur, ið hava hjóltvørmát uppá 12 tummar ella minni, og sum ikki eru ætlaðar vaksnum. Tryggingin fevnir eisini um herverk í sambandi við tjóvarí og tá roynt verður at stjala súkkluna.

**77.02** Við góðkent lás er at skilja eitt lás, ið er góðkent av tryggingarfelagnum ella D.V.N.

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Tryggingin fevnir bert um, um nummarið á grindini kann uppgevast og váttan fyri tað D.V.N. góðkenda lásið verður send tryggingarfelagnum.

**77.03** Tjóvarí og herverk í hesum sambandi verða endurgoldin á henda hátt, roknað eftir nývirði:

Frá tí degi súkklan er keypt sum nýggj.

**Um súkklan er:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Upp til | 1 | ár | 100% |
| | 2 | ár | 90% |
| | 3 | ár | 81% |
| | 4 | ár | 73% |
| | 5 | ár | 66% |
| | 6 | ár | 59% |
| | 7 | ár | 53% |
| | 8 | ár | 48% |
| | 9 | ár | 43% |
| | 10 | ár | 39% |
| | 11 | ár | 35% |
| | 12 | ár | 32% |
| | 13 | ár | 29% |
| | 14 | ár | 26% |
| | 15 | ár | 23% |
| | 16 | ár | 21% |
| | 17 | ár | 19% |
| | 18 | ár | 17% |
| | 19 | ár | 15% |
| eldri enn | 19 | ár | 10% |

**77.04** Um tað kann prógvast, at súkklan er gjørd í fullgóðan stand, verður endurgjald veitt í mun til, hvat tað kostar at fáa til vega eina tilsvarandi brúkta súkklu. Aldurin á súkkluni verður at rokna frá tí degi, tá súkklan er gjørd í fullgóðan stand.

**77.05** Verður súkklan funnin aftur, áðrenn endurgjaldið er útgoldið, og skaði er hendur á hana, meðan hon hevur verið burtur, verður umvælingin at gjalda sambært rokning. Tó kann í ongum føri verða goldið meira enn tað, ið goldið vildi verið, um so varð, at súkklan ikki kom aftur íaftur.

**79.00 Vatnskaði á lutir hjá leigarum**
Umframt tær í §§ 30.00, 50.00 og 60.00 nevndu skaðaorsøkir, fevnir tryggingin um skaðar av:

**1.** avfalli og smeltivatni, ið spríkir ígjøgnum rivur í bygninginum.

**2.** vatni, ið seyrar úr rørum (eisini ikki fjaldum rørum), ið eru uttanfyri hølini, sum tryggingartakarin leigar.

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Tryggingin fevnir ikki um skaða:

**a)** um útleigarin hevur endurgjaldskylduna sambært leigulógini ella leiguavtalu.

**b)** um leigarin hevði skyldu til at umvæla bygningskaðan, ið var orsøk til vatnskaðan.

**c)** á lutir uttanfyri bygning.

# Innbústrygging

## E. Felagstreytir fyri C og D

### 80.00 Upprudding
Tryggingin fevnir um neyðugar útreiðslur til upprudding av teim tryggjaðu lutunum í sambandi við skaða, sum tryggingin fevnir um. Upprudding og burturbeining av tryggjaðum lutum, sum sambært skaðauppgerðini ikki kunnu nýtast aftur.

### 81.00 Fylgiskaði av avfalli
Tryggingin fevnir um skaða av avfalli á tryggjaðar lutir, ið hava beinleiðis samband við og henda beint aftaná ein skaða, ið sethúsatreytirnar hjá Betri Trygging fevna um ella vildu fevnt um.

### 82.00 Fylgiskaði av bygningsskaða
Tryggingin fevnir um skaða á tryggjaðar lutir, sum er ein beinleiðis fylgja av niðanfyri nevndu skaðaorsøkum, sum sethúsatreytirnar hjá Betri Trygging fevna um ella vildu fevnt um:

**1.** Lutum, ið koma bóltandi ella detta niður.
**2.** Kavatrýsti.
**3.** Ákoyring.

### 83.00 Fylgiskaði av øðrum brádliga virkandi skaða
Tryggingin fevnir um skaða av smeltivatni og avfalli, ið brádliga treingir inn ígjøgnum rivur og op í bygninginum. Tað er ein treyt, at skaðin hendir samstundis og er ein beinleiðis fylgja av øðrum brádliga virkandi skaða á bygning ella yvirbreiðingartilfar á bygningi. Yvirbreiðingartilfarið skal vera rætt fest.

### 90.00 Skaðauppgerð
**90.01** Endurgjaldið skal so vítt gjørligt seta tann tryggjaða í somu fíggjarligu støðu, sum hann var í beint áðrenn skaðin hendi.

**90.02** Áðrenn nakað endurgjald verður goldið, skal skaðin sýnast og virðismetast.

**90.04** Tá ið ein skaði verður avroknaður, eigur at vera havt fyri eyga, um tann skaddi luturin er tryggjaður til fult virði, og um so ikki er, verður borið at sambært tryggingaravtalulógini § 40.

**90.05 Betri Trygging hevur rætt til:**
**a)** at seta tann skadda lutin aftur í sama stand, hann hevði, beint áðrenn skaðin hendi, um hetta er gjørligt. Eru umvælingarútreiðslurnar meir enn 50% av nývirðinum, tá skaðin hendir, kann tryggingartakarin velja at fáa endurgjald sambært b) ella d).

**b)** at fáa til vega samlíkan lut við tann, ið er skaddur ella stolin, um hetta er uttan munandi bága fyri tryggingartakaran, t.d. apple exchange. Kann samlíkur lutur ikki fáast, kann Betri Trygging velja at lata samsvarandi nýggjan lut, sum í mest møguligan mun svarar til tann skadda ella stolna. Tryggingartakarin kann tó velja at fáa endurgjald sambært d).

**c)** at góðgera virðisminkingina.
**1.** Virðisminkingin verður roknað sum virðið á lutinum áðrenn skaðan við frádrátti fyri virðið á lutinum aftaná umvæling. Eru umvælingarútreiðslurnar meira enn 50% av nývirðinum, tá skaðin hendir, kann tryggingartakarin velja at fáa endurgjald sambært b) ella d).

**2.** Tryggingartakarin kann velja, í staðin fyri umvæling, at fáa virðisminkingina gottgjørda. Virðisminkingin verður tá roknað sum virðið á lutinum áðrenn skaðan við frádrátti fyri virðið á lutinum aftaná skaðan.

**d)** at veita kontant endurgjald t.v.s. at javna tapið, ið hevur verið í reiðum peningi. Verður kontant endurgjald veitt orsakað av, at tað ikki er gjørligt at fáa til vega samsvarandi lut, verður støði tikið í kostnaðinum av at framleiða samsvarandi nýggjan lut. Tryggingarfelagið hevur tó ikki skyldu til at gjalda meira, enn tað, ið tað kostar at fáa til vega ein nýggjan lut, sum samsvarar við tann skadda ella stolna lutin.

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Er tryggingartakarin atvoldin til, at umvælingin verður seinkað, veitir tryggingin ikki endurgjald fyri tann kostnað, sum harav stendst.

**2.** Endurgjald verður ikki veitt fyri kosmetiskan skaða, og tryggingin fevnir heldur ikki um endurgjald fyri, at nýggir lutir ikki hava sama lit sum teir upprunaligu.

**90.06** Sí tó § 120.00 um undirtrygging.

# Innbústrygging

**90.07** Endurgjald viðv. el-skaða, sí tó § 170.00.

**90.08** Endurgjald viðv. innbrotstjóvaríi, sí tó § 70.00.

**90.09** Endurgjald viðv. vørum í køli- og frystiskápum, sí § 14.25.

**90.10** Skaði á fartelefon við tilhoyri verður endurgoldin á henda hátt, roknað eftir nývirði:

**a)** Frá tí degi luturin er keyptur sum nýggjur.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Um luturin er: | 0-1 | ár | 100% |
| | 1-2 | ár | 90% |
| | 2-3 | ár | 70% |
| | 3-4 | ár | 50% |
| | 4-5 | ár | 30% |
| yvir | 5 | ár | 10% |

**b) El-skaði**
Avskrivingin er eisini galdandi fyri el-skaðar, hóast ásetingina í grein 170.02.

**c) Tøknitrygging**
Viðvíkjandi tøknitrygging er endurgjaldið 100% upp til 4 ár. Tá fartelefonin er yvir 4 ár er einki endurgjald.

**90.11** Tryggingarfelagið kann, men hevur ikki skyldu til at yvirtaka skaddar lutir.

**90.12** Er skaði á upptøkur á bondum og filmum, ein sjálvur hevur gjørt, verður endurgjald bert latið fyri keyp av nýggjum bondum og filmum. Eru negativ til skaddu filmarnar tøk, verður endurgjald veitt fyri framkalling.

**90.13** Er skaði á edv-skráir ella elektroniskar goymslumiðlar, t.d. kassettur, disklar og fløgur, verður endurgjald bert latið fyri keyp av nýggjum kassettum, disklum, fløgum v.m. Tryggingin veitir ikki endurgjald fyri rit, ein sjálvur hevur lagt inn á teldu.

**90.14** Skaðabót verður ikki veitt fyri frumrit og tekniskar tekningar.

## 98.00 Skjalprógv

**98.01** Um skaði hendir, kann tryggingarfelagið krevja, at tryggjaði skjalprógvar ella ger sannlíkt at virði og aldur á skaddu ella stolnu lutunum samsvarar við tað, ið stendur í skaðafráboðanini. Kann tryggingartakarin ikki skjalprógva ella gera sannlíkt krav sítt, kann hetta fáa ávirkan á endurgjaldið.

**98.02** Tryggingartakarin eigur tí at goyma kvittanir fyri allar nýggjar lutir. Fyri dýrar lutir eiga kvittanir at verða goymdar í 5 ár.

**98.03** Myndir eiga at verða tiknar av serliga virðismiklum lutum og myndirnar goymdar uttanfyri tryggingarstaðið, t.d. í kundaboks í peningastovni.

## 100.00 Tryggingarvirði

Tað er tryggingartakarans skylda at áseta og halda trygg-ingarhæddina fyri innbúgv viðlíka, so hvørt sum innbúgvið veksur í virði bæði við tað, at prísurin hækkar, og tí at nýtt innbúgv kemur afturat. Sí §§ 13.00, 14.00 og 15.00.

## 110.00 Yvirtrygging

Í ongum føri kann verða goldið meira í skaðabót enn tann í tryggingarskjalinum tilskilaða tryggingarhædd, og heldur ikki meira enn tað, ið skaðin veruliga kostar at umvæla. Sí tryggingaravtalulógina § 39.

## 120.00 Undirtrygging

**120.01** Um virðið av teim tryggjaðu lutunum er meira enn tryggingarhæddin, er talan um undirtrygging. Sí tryggingar-avtalulógina § 40.

**120.02** Er virðið t.d. tað dupulta av tryggingarhæddini, ber tað við sær, at ein skaði uppá t.d. kr. 50.000,00 bert verður endurgoldin við kr. 25.000,00.

## 130.00 Endurgjald

**130.01** Skaðabótin verður uppgjørd eftir, hvussu mikið tað kostar at fáa til vega samsvarandi lutir, sum teir skaddu ella oyðiløgdu.

**130.02** Lutir sum eru keyptir nýggir, eru yngri enn 2 ár og vóru óskaddir áðrenn skaðahendingina, verða endurgoldnir við tí, sum samsvarandi lutir kosta at keypa sum nýggir.

**130.03** Fyri aðrar lutir kann rímiligur frádráttur bert gerast fyri tað, hesir lutir eru minkaðir í virði orsakað av aldri, nýtslu, móta, lækkaðum nýtsluvirði ella av øðrum orsøkum, treytað av, at nyttuvirðið er munandi minkað. Sí tryggingaravtalu-lógina § 37, 2. petti.

# Innbústrygging

## 140.00 Kontant endurgjald

Útgjalding av kontantum endurgjaldi kann verða avmarkað av rættindum, ið triði persónur hevur í teim tryggjaðu lutunum sambært avtalu og/ella lóggávu.

## F. Tilvalstryggingar

Tryggingarnar í Deild F eru bert galdandi, um hetta er tilskilað í tryggingarskjalinum.

Felagstreytirnar í deild B og vanligu reglurnar í deild H eru galdandi fyri tilvalstryggingarnar (grein 150.00, 160.00 og 170.00).

## 150.00 Tøknitrygging

**150.01** Tryggjaðir lutir

**Tryggingin fevnir um:**
**a)** elektrisk tól við tilhoyri, sum tryggjaði eigur.

**Tryggingin fevnir ikki um:**
**b)** skaða á motordrivnar lutir, ið eru til uttandura brúk, t.d. urtagarðsamboð og skutarar.
**c)** skaða, ið einans hendir á leysar lutir til elektrisk tól, t.d. káplar, taskur, battarí, geymar v.m.
**d)** ritbúna (software) og dáta.

**150.02 Skaðaorsøk**
Tryggingin veitir endurgjald fyri skaða, tá talan er um:

**a)** virkisbrek á elektrisk tól, um mekaniskt ella elektriskt brek ger, at tólið ikki kann brúkast til sítt endamál.

**b)** brek á skíggjadepil á flatskíggja, um brekið er útyvir tað, ið framleiðarar ella innflytarar góðtaka í teirra leiðreglum.

**150.03 Skaðauppgerð**
Tryggingin veitir endurgjald til tólið er 4 ára gamalt frá fyrsta keypsdegi. Hetta er eisini galdandi, hóast tólið er keypt brúkt.

Skaðin skal verða staðfestur og fráboðaður innan tólið er 4 ára gamalt.

Talan er um eina 1. risikotrygging. Tað vil siga, at undirtrygging ikki verður gjørd galdandi fyri hesar lutir, hóast innbúgvið er undirtryggjað.

Endurgjaldið er í mesta lagi kr. 30.000,00 pr. lut og kr. 100.000,00 pr. skaðahending.

**150.04 Sjálvsábyrgd**
Sjálvsábyrgd in er kr. 1.000,00 pr. skaðahending.

**150.05 Luturin latast inn**
Tað er treyt fyri endurgjaldi, at skaddi luturin kann latast tryggingarfelagnum.

**Undantøk og avmarkingar**
Tryggingin fevnir ikki um skaða, ið:

**1.** kann metast at koma undir nakað av tí, ið nevnt er frammanundan í innbústryggingini at verða fevnt um ella undantikið.
**2.** er kosmetiskur, t.d. litmunur.
**3.** ikki ger lutin óbrúkiligan, t.d. skeinur, skónur, svíðing, dálking ella sprutting o.tl.
**4.** kemst av overving, skeivari konstruktión, skeivari uppseting, skeivari tilseting ella skeivari umvæling.
**5.** kemst av sliti, aldri ella manglandi viðlíkahaldi.
**6.** hendir, tá vælt verður um.
**7.** kemst av virus ella teldusníkum o.l.
**8.** er umfataður av garanti ella ábyrgd seljarans.

## 160.00 Brádligur skaði

**160.01 Tryggjaðir lutir**

**Tryggingin fevnir um:**
**a)** vanligt innbúgv, sambært grein 13.21.
**b)** serligt innbúgv, sambært grein 13.22.
**c)** súkklur, sambært grein 13.50.

**Tryggingin fevnir ikki um:**
**d)** skaða á lutir, ið eru nevndir í grein 14.00 (gull, peningur, løntakaraamboð v.m.).
**e)** smáar róðrarbátar (í mesta lagi 5,5 metrar), kanoir og kajakkir, brimfjalir við tilhoyri og leysamotorar (í mesta lagi 5hk).

# Innbústrygging

**f)** húsdjór.
**g)** skaða á motordrivnar lutir, ið eru til uttandura brúk, t.d. urtagarðsamboð og skutarar.
**h)** bygningslutir.
**i)** læntar ella leigaðar lutir fyrstu 30 dagarnar, sí tó grein 201.81.
**j)** lutir, ið eru mistir, gloymdir ella vorðnir burtur.

**160.02 Skaðaorsøk**
Tryggingin fevnir um ein og hvønn annan brádligan ákomnan skaða, ið ikki kann metast at koma undir nakað av tí, ið nevnt er frammanundan at verða fevnt um ella undantikið.
Við brádliga ákomnan skaða er at skilja skaði, ið skyldast uttanífrá brádliga komandi og virkandi atvold. Atvold og avleiðing skulu sostatt henda samstundis.

**160.03 Skaðauppgerð**
Skaðar verða gjørdir upp eftir somu reglum, ið eru galdandi fyri innbústryggingina.

Talan er um eina 1. risikotrygging. Tað vil siga, at undirtrygging ikki verður gjørd galdandi fyri hesar lutir, hóast innbúgvið er undirtryggjað.

Endurgjaldið er í mesta lagi kr. 30.000,00 pr. lut og kr. 100.000,00 pr. skaðahending.

**160.04 Sjálvsábyrgd**
Sjálvsábyrgd in er kr. 1.000,00 pr. skaðahending.

**160.05 Luturin latast inn**
Tað er treyt fyri endurgjaldi, at skaddi luturin kann latast tryggingarfelagnum.

**Undantøk og avmarkingar**
Tryggingin fevnir ikki um skaða, ið:

**1.** er kosmetiskur, t.d. litmunur.
**2.** ikki ger lutin óbrúkiligan, t.d. skeinur, skónur, svíðing, dálking ella sprutting o.tl.
**3.** hendir, tá vælt verður um.
**4.** er umfataður av garanti ella ábyrgd seljarans.
**5.** er elvdur av skrivi-, tekni- ella máliamboðum.
**6.** hendir undir flyting millum bústaðir.
**7.** er elvdur av djórum.
**8.** kemst av overving, ella av, at tólið verður skeivt brúkt.

## 170.00 El-skaði

**170.01** Tryggingin fevnir um skaða á elektriskar leidningar ella komponentar í elektriskum tólum, ið lógliga kunnu verða seld ella nýtt í Føroyum, orsakaður av skammlopi, induktión, streymvillu, yvirspenningi ella tílíkum, um tey eru ætlaði til ikki-vinnuliga nýtslu hjá teim tryggjaðu. Sí annars § 13.00.

Harumframt fevnir tryggingin um skaða á aðrar tryggjaðar lutir, sum standast av el-skaða.

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Tryggingin fevnir ikki um skaða sum:

**a)** kemur undir ábyrgdartrygd, sum sølumenn standa til svars fyri.
**b)** kemst av skeivari konstruktión, skeivari uppseting, skeivari tilseting og skeivari umvæling.
**c)** hendir, tá vælt verður um.
**d)** kemst av overving.
**e)** hendir av, at tólið verður skeivt brúkt.

**170.02** Skaði á el-riknar lutir verður endurgoldin á henda hátt, roknað eftir nývirði:

Frá tí degi luturin er keyptur sum nýggjur.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Um luturin er: | Upp til | 2 ár | 100% |
| | | 3 ár | 80% |
| | | 4 ár | 70% |
| | | 5 ár | 60% |
| | | 6 ár | 40% |
| | eldri enn | 6 ár | 20% |

**170.03** Útreiðslur til umvæling verða endurgoldnar eftir somu reglum.

Viðvíkjandi endurgjaldi fyri fartelefonir við tilhoyri, sí grein 90.10.

# G. Serstakar tryggingar

## 180.00 Glastrygging

**180.01** Tryggingin fevnir um glas, ið tann tryggjaði sum leigari hevur ábyrgdina av, um so er, at bygningstryggingin ikki fevnir um hetta.

# Innbústrygging

**180.02** Tryggingin fevnir um glas ella tilfar, ið nýtt verður í staðin fyri glas, og er innsett sum bygningslutur, her íroknað innmúrað spegl og keramiskar kókiplátur.

**180.03** Tryggingin fevnir bert um tryggjaðu lutirnar, tá ið teir í heilum líki eru ísettir, har teir eru ætlaðir.

**180.04** Tryggingin veitir endurgjald fyri teir tryggjaðu lutirnar, tá teir eru vorðnir ónýtiligir orsakað av broti, skøvum ella avdotnum splintrum.

**180.05** Endurgjald verður veitt fyri tað, sum tað kostar at skifta teir skaddu lutirnar út við tilsvarandi nýggjar. Er ikki gjørligt at fáa lutir, ið eru sama slag sum teir skaddu, verður goldið eitt kontant endurgjald svarandi til prísin á tilsvarandi lutum, ið vanligir vóru, tá ið skaðin hendi. Útreiðslur til umvæling kunnu ikki vera hægri enn kostnaðurin av at skifta teir skaddu lutirnar út.

**180.06** Tryggingin veitir endurgjald fyri skaða av avfalli, ið er ein beinleiðis fylgja av glasskaðanum.

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Lekar í sambindingum millum termorútar verða ikki endurgoldnir.
**2.** Tryggingin veitir ikki endurgjald fyri kostnað, ið onnur trygging fevnir um.

## 190.00 Kummutrygging

**190.01** Tryggingin fevnir um kummur, ið tann tryggjaði sum leigari hevur ábyrgdina av, um so er, at bygningstryggingin ikki fevnir um hetta.

**190.02** Tryggingin fevnir um handvøsk, baðikør, bidét, wc-kummur og sisternur, sum eru innsett sum bygningslutir. Um tilhoyr, so sum wc-setur og kranar, ikki kunnu nýtast saman við útskifta sanitetinum, fevnir tryggingin eisini um hesar lutir.

**190.03** Tryggingin fevnir bert um teir tryggjaðu lutirnar, tá teir í heilum líki eru uppsettir, har teir eru ætlaðir.

**190.04** Tryggingin veitir endurgjald fyri teir tryggjaðu lutirnar, tá teir eru vorðnir ónýtiligir orsakað av broti, skøvum ella avdotnum splintrum.

**190.05** Endurgjald verður veitt fyri tað, sum tað kostar at skifta teir skaddu lutirnar út við tilsvarandi nýggjar. Er ikki gjørligt at fáa lutir, ið eru sama slag sum teir skaddu, verður goldið eitt kontant endurgjald svarandi til prísin á tí saniteti, ið vanligt var, tá ið skaðin hendi. Útreiðslur til umvæling kunnu ikki vera hægri enn kostnaðurin av, at skifta teir skaddu lutirnar út.

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Tryggingin svarar ikki fyri tað, at útsjóndin ikki verður tann sama, sum áðrenn skaðin hendi (kosmetiskur ójavni). Tað verður heldur ikki veitt endurgjald fyri, at tað ikki er gjørligt at fáa lutir av sama liti, sum teir skaddu.

**2.** Tryggingin veitir ikki endurgjald fyri kostnað, ið onnur trygging fevnir um.

## 200.00 Endurhýsing og meirútreiðslur

**200.01** Tryggingin veitir endurgjald fyri skjalprógvaðar eyka útreiðslur at leiga høli svarandi til tey høli, sum tryggingartakarin nýtti, og til útreiðslur at goyma tryggingartakarans persónliga innbúgv og leysafæ, um so er, at bústaðurin er vorðin ónýtiligur orsakað av einum skaða, ið tryggingin veitir endurgjald fyri. Fyri leigarar, lutaeigarar og eigarar av eigaraíbúðum, veitir tryggingin eisini endurgjald, um so er, at tey tryggjaðu ikki fáa búð í bústaði sínum orsakað av einum skaða, ið sethúsatreytirnar hjá Betri Trygging fevna um ella vildu fevnt um. Tað er ein treyt, at útreiðslurnar ikki kunnu krevjast goldnar av eigaranum.

**200.02** Endurgjald verður veitt til ein mánaða eftir at skaðin er umvældur, tó í mesta lagi 12 mánaðir eftir, at skaðin er hendur.

**200.03** Harumframt veitir tryggingin endurgjald fyri rímiligar skjalprógvaðar meirútreiðslur og neyðugar útreiðslur til út- og innflyting, um so er, at bústaðurin er vorðin ónýtiligur orsakað av einum skaða, ið tryggingin veitir endurgjald fyri.

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Verður skaðin ikki umvældur, ella verður bygningurin bygdur uppaftur í øðrum líki, verður endurgjald veitt einans fyri ta tíð, ið hevði gingið at gjørt bygningin aftur í sama stand, sum hann var í, áðrenn skaðin hendi.

# Innbústrygging

**2.** Er tryggingartakarin atvoldin til, at umvælingin verður seinkað, veitir tryggingin ikki endurgjald fyri kostnað, ið harav stendst.

**3.** Tryggingin veitir ikki endurgjald fyri kostnað, ið onnur trygging fevnir um.

## 201.00 Privat ábyrgdartrygging

**201.01** Tryggingin er galdandi í teimum førum, har tey tryggjaðu sum privatpersónar koma sær undir løgfrøðisliga endurgjaldsábyrgd.

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Tryggingin fevnir ikki um ábyrgd fyri skaða, ið hendir, meðan hin tryggjaði hevur verið í arbeiði fyri onnur ella verið í vinnu.

**201.02** Skaðar á annans mans lutir ella á onnur menniskju kunnu annaðhvørt standast av einum tilvildarligum óhappi ella viðurskiftum, tey tryggjaðu hava ábyrgd av.

**201.03** Tey tryggjaðu kunnu eftir umstøðunum koma sær undir endurgjaldsábyrgd, um onnur verða fyri missi, orsakað av bjargingartiltøkum, til fyrimunar fyri tey tryggjaðu.

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Tryggingin fevnir bert um hetta, í tann mun, Arbeiðsskaðatryggingarlógin ikki fevnir um hesa ábyrgd.

**201.04 Nær er ábyrgd?**
Vanliga hevur ein ábyrgd, um skeivt er atborið, mistøk eru gjørd, ella onkur hevur verið óskettin.

**201.05** Har aftur ímóti hevur ein ikki ábyrgd fyri hendiligum óhappi. Hann, ið óhappið rakar, kann sum oftast ansa eftir óhappinum. Tessvegna er eingin endurgjaldsskylda. Tað er mangan trupult at avgera, nær talan er um hendiligt óhapp ella ábyrgd.

**201.06** Latið tí vera við straks at átaka tygum ábyrgd. Sigið heldur tryggingarfelagnum gjølla frá, hvussu óhappið hendi, og vil tryggingarfelagið leiðbeina tygum í slíkum føri.

**201.20 Skaðar, ið børn gera**
Eins og vaksin kunnu børn eisini koma sær undir egna løgfrøðisliga endurgjaldsábyrgd. Men eftir vanligari nýtslu í rættargongd verða børn undir 5 ár sum heild ikki løgd undir ábyrgd fyri gerðir teirra.

**201.21** Foreldur hava bert endurgjaldsábyrgd fyri tær vanlukkur børn elva, um tey ikki hava ansað nóg væl eftir teimum.

**201.22 Skaði á onnur menniskju:**
Tryggingin fevnir um skaða á onnur menniskju, ið børn elva, sjálvt um tað ikki fyriliggur løgfrøðislig ábyrgd, um so er, at tann væntandi løgfrøðisliga ábyrgdin bert stendst av, at barnið er so ungt ella ikki nóg mikið framkomið.

**Skaði á lutir:**
Somuleiðis fevnir tryggingin um skaða á lutir, ið børn elva – tryggingartakarin skal tó sjálvur gjalda kr. 1.000,00 av hvørji skaðahending.

**201.30 Kostnaður og rentur**
Tryggingin fevnir eisini um kostnað í sambandi við endurgjaldssakir og rentur av endurgjaldinum, sjálvt um tað í hesum føri verður farið upp um tryggingarhæddina.

**201.40 Skaðar voldir av eigara/nýtara**
Tryggingin fevnir eisini um ábyrgd fyri antennur, tekniskar innleggingar og annað, her íroknað ábyrgd mótvegis húsaeigaranum, eins og ábyrgd sum eigari ella brúkari av:

- frítíðarhúsi og grund
- hestum til egna nýtslu
- egnari/privatari grund og húsum til eitt ella tvinni húski um so er, at húsini sum heild verða nýtt til íbúð, og hin tryggjaði býr í húsunum.

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Tá talan er um ábyrgd fyri niðurrívingar–, útgravingar–, piloteringsarbeiði o.a., verður einans veitt endurgjald fyri pers ónskaða.

**201.50 Dálking**
Tryggingin fatar um skaðar, ið standast av dálking av einstakari hending, til dømis, at olja seyrar úr einum tanga

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Tað er ein treyt, at almennar fyriskipingar eru fylgdar.
**2.** Tryggingin fevnir tó ikki um tær útreiðslur og tann miss, ið hini tryggjaðu hava verið fyri.

# Innbústrygging

**201.60 Endurgjald uttanlands**
Ábyrgdartryggingin er galdandi á ferðum uttanlands í upp í 3 mánaðir.

**201.70 Hvussu leingi fæst endurgjald?**
Tryggingin fevnir um ábyrgd fyri skaðar, sum henda meðan tryggingin er í gildi, eisini sjálvt um so er, at kravið ikki verður reist fyrrenn eftir, at tryggingin er farin úr gildi.

**201.80 Ráð frá tryggingini**
Tryggingarfelagið er tygum til hjálpar, um so er, at krav, ið ikki er heimild fyri, verður reist móti tygum í førum, ið tryggingin fevnir um.

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Tryggingin fevnir ikki um endurgjaldsábyrgd, ið tygum hava átikið tygum, um so er, at tygum í roynd og veru eru uttan skyld í skaðanum.

**2.** Tryggingin fevnir ikki um skaða, ið:
**a.** er voldur við vilja, uttan so, at skaðavoldarin er 14 ár ella yngri ella at hann ikki hevur verið so mikið framkomin, at hann hevur verið førur fyri at fara fram við skili, tí hann er sálarliga óbúgvin.
**b.** er voldur í fyllskapi ella undir ávirkan av doyvandi evnum.
**c.** er voldur av hundum.
**d.** er elvdur við bátum:
Tryggingin er kortini galdandi fyri:
Skaða á lutir, ið er voldur av ella við bátum 5,5 metrar ella styttri og við motororku 5 hk ella minni. Skaða á onnur menniskju, voldur av ella við bátum við motororku 25 hk ella minni.
**e.** er hendur meðan hin tryggjaði hevur nýtt motordrivin akfør ella loftfør, íroknað radiostýrd modelflogfør og sveimflogfør, sum sjálvstøðug ábyrgdartrygging kann teknast fyri.
Tryggingin fevnir kortini um skaðar á onnur menniskju, ið komast av:
**1.** at leika verða nýtt, við motororku 5 hk ella minni,
**2.** at urtagarðsamboð við motororku 10 hk ella minni verða nýtt,
**3.** at koyristólar verða nýttir,
**4.** at gokarts við 25 hk ella minni verða nýttir.

Tryggingin veitir harumframt endurgjald fyri skaðar á sjálvt tað motordrivna akfarið ella hinar motorriknu lutirnar, um skaðavaldarin er 14 ár ella yngri. Hevur hin tryggjaði ábyrgd sambært ferðslulógini, verður endurgjald veitt samsvarandi teimum tryggingarhæddum, ið nevndar eru í ferðslulógini.

**3.** Tryggingin fevnir ikki um endurgjaldsábyrgd, ið einans er ein fylgja av skaða á persón ella lut.

**4.** Tryggingin fevnir ikki um skaða á lutir, ið viðkomandi tryggjaði eigur, nýtir, hevur nýtt, lænir, leigar, goymir, flytir, viðgerð, handfer ella á annan hátt hevur í varðveitslu.

**5.** Endurgjaldsskylda tryggingarfelagsins kann vera avmarkað av viðurskiftum, ið eru viðgjørd í lógini um endurgjaldsábyrgd §§ 19–22.

**201.81 Skaði á lænt og leigað innbúgv**
Tryggingin fevnir um skaða á lænt og leigað innbúgv í 1 mánað frá yvirtøkudegnum. Við innbúgv er at skilja lutirnir, ið nevndir eru í §§ 13.20 til 14.25.

Tryggingartakarin skal tó sjálvur gjalda 10% og í minsta lagi kr. 200,00 av skaðabótini fyri hvørja skaðahending.

**201.90 Tryggingarhæddir**

**Skaði á lutir og dýr:**
Ábyrgd fyri skaða á annans mans lutir og dýr verður endurgoldin við upp í kr. 2.000.000,00 fyri hvørja skaðahending.

**Skaði á onnur menniskju:**
Ábyrgd fyri skaða á onnur menniskju verður endurgoldin við upp í kr. 10.000.000,00 fyri hvørja skaðahending.

## 202.00 Gestaboð

Sjálvt um tað ikki fyriliggur løgfrøðilig ábyrgd, er tryggingin eisini galdandi fyri skaðar, sum av ósketni koma á annan mans lutir, tá ið fólk koma saman privat (ikki alment).

Tryggingartakarin skal tó sjálvur gjalda kr. 500,00 av skaðabótini fyri hvørja skaðahending.

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Tryggingin fevnir ikki um skaðar, ið henda av hendiligum óhappi.

# Innbústrygging

## 205.00 Rættarhjálp

Niðanfyri er nevnt, hvat rættarhjálpartryggingin í høvuðsheitum fevnir um. Eftir umbøn sendir tryggingarfelagið fullfíggjaðar treytir fyri trygging til rættarhjálp eins og tað er til hjálpar og vegleiðing.

**205.01** Tryggingin fevnir um kostnað, sum hin tryggjaði hevur havt av rímiligari grund fyri trætnaði, her íroknað rættar– og gerðarrættarmál.

**205.02** Við trætnað er at skilja ósemja, ið ber við sær rímiligt grundarlag fyri einum borgarligum sakarmáli.

**205.03** Tað er ein treyt, at hin tryggjaði leitar sær hjálp hjá einum advokati, ið tekur sær av málinum. Harumframt hevur tryggjaði skyldu at søkja um fría rættarviðgerð, um so er, at hann lýkur tær fíggjarligu treytirnar fyri hesum.

**205.04** Tryggingin veitir í mesta lagi kr. 200.000,00 í endurgjaldi fyri hvørt mál.

Hin tryggjaði skal sjálvur rinda 10% av kostnaðinum, tó í minsta lagi kr. 500,00.

**205.05** Rættarhjálpartryggingin er galdandi á ferðum í útlondum í upp til 3 mánaðir.

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Tryggingin fevnir ikki um kostnað av:

**a)** ferðing og mistari úrtøku.

**b)** privatum injurie- (útspillingar-) og valdsøkum.

**c)** revsisøkum.

**d)** søkum í sambandi við atvinnuvirkið hins tryggjaða.

**e)** innkrevjingarsakir móti tryggjaða í teimum førum, tá einki er at ivast í, at kravið er rættvíst.

**f)** søkum um skatta– og avgjaldsmál.

**g)** skiftisøkum.

**h)** hjúnarsøkum (í høvuðsheitum).

**i)** søkum um fastogn, stuttleikabátar ella motorakfør, har hin tryggjaði er partur sum eigari ella brúkari.

Tryggingin fevnir tó um útreiðslur í søkum, har hin tryggjaði er partur sum eigari ella brúkari av eigara– ella lutaíbúð ella grund, har ikki er bygt á, eins og prutlum, har skrokktrygging ikki er teknað.

Umframt er tryggingin galdandi í 2 vikur aftaná, at hin tryggjaði er vorðin eigari av fastogn ella stuttleikabáti um so er, at vanlig trygging fyri sethús ella stuttleikabát ikki er teknað ella yvirtikin.

## H. Vanligar reglur

## 220.00 Tryggingargjøld v.m.

**220.01** Tryggingargjaldið fellur fystu ferð til gjaldingar beinanvegin, tryggingin kemur í gildi, og seinni gjøld teir í tryggingarskjalinum ásettu gjalddagar.

**220.02** Gjaldskrøv verða send til tann av tryggingartakaranum fráboðaða gjaldstað.

**220.03** Ynskist broyting í gjaldskipanini, skal tryggingartakarin beinanvegin geva boð um hetta, eins og tryggingartakarin eigur at boða frá beinanvegin, um hann broytir gjaldstað.

**220.04** Verður tryggingargjaldið ikki goldið, tá ið krav er sent, sendir tryggingarfelagið áminning í fyrsta lagi 14 dagar aftaná.

**220.05** Er tryggingargjaldið ikki goldið í seinasta lagi 14 dagar aftan á áminning, er tryggingarfelagið leyst av ábyrgd, og tryggingartakarin hevur ikki rætt til endurgjald.

**220.06** Tryggingarfelagið skilar sær rætt til at krevja eykakostnaðin av hesum endurgoldnan.

## 221.00 Sjálvsábyrgd

**221.01** Tað er tilskilað í tryggingarskjalinum um tryggingin er teknað við sjálvsábyrgd. Eru aðrar sjálvsábyrgdir ásettar í hesum treytum ella í tryggingarskjalinum, er hægra sjálvsábyrgd in galdandi.

# Innbústrygging

**221.02** Viðvíkjandi sjálvsábyrgd um sí:

| | |
|---|---|
| Tøknitrygging | § 150.04 |
| Brádligur skaði | § 160.04 |
| Lænt og leigað innbúgv | § 201.81 |
| Gestaboð | § 202.00 |
| Rættarhjálp | § 205.04 |

## 222.00 Prístalsjavning

**222.01** Tryggingargjaldið verður prístalsjavnað árliga við brúkaraprístalinum hjá Hagstovu Føroya. Javnað verður tó altíð við í minsta lagi 1 prosenti í mun til árið fyri. Prístalsjavningin verður framd høvuðsgjalddagin.

**222.02** Heldur útgávan av almenna brúkaraprístalinum uppat, verður tryggingin prístalsjavnað við prístali, ið Betri Trygging ger/góðtekur.

## 230.00 Tíðarskeið og uppsøgn

Tryggingin stendur við, til tryggingingartakarin ella tryggingarfelagið skrivliga sigur hana upp við 30 daga freist til mánaðarlok.

## 235.00 Angringarrættur

**235.01** Tryggingingartakarin kann strika tryggingina frá tekningardegnum, um tryggingarfelagið fær skrivliga fráboðan um tað, áðrenn 14 dagar eru farnir. Hetta merkir, at støðan verður, sum var tryggingin als ikki teknað. Møguligar útreiðslur, sum felagið hevur havt av tryggingini, kunnu krevjast afturgoldnar.

**Undantøk og avmarkingar**

**1.** Angringarrætturin er ikki galdandi fyri tryggingar, ið eru teknaðar fyri eitt tíðarskeið, ið er ein mánaði ella styttri.

## 240.00 Uppsøgn aftaná skaða

Uttan mun til ta í § 230.00 nevndu freist, hava bæði tryggingarfelagið og tryggingartakarin rætt til at siga tryggingina upp við 14 daga ávaring, um hetta verður gjørt innan 14 dagar eftir, at ein skaði er goldin ella avvístur.

## 250.00 Broyting av gjaldskránni og tryggingartreytunum

**250.01** Ger tryggingarfelagið broytingar í gjaldskrá síni, ella tryggingartreytirnar verða broyttar, hevur tryggingarfelagið rætt til við 1 mánaða ávaring at seta nevndu broytingar í verk.

**250.02** Vil tryggingartakarin ikki góðtaka eina hækking av tryggingargjaldinum ella strangari tryggingartreytir, kann tryggingin sigast upp av báðum pørtum við 14 daga ávaring.

## 260.00 Tá tryggingin verður teknað

**260.01** Tryggingartakarin hevur ábyrgdina av, at tær í tryggingarskjalinum nevndu upplýsingar eru rættar.

**260.02** Skeivar upplýsingar kunnu, sambært tryggingar-avtalulógini §§ 4 – 10 føra við sær, at rætturin til endurgjald verður avmarkaður, ella at endurgjaldið fellur burtur.

## 270.00 Vandabroytingar og flyting

**270.01** Tryggingartakarin eigur at siga Betri Trygging frá, soleiðis at tryggingarfelagið kann avgera, um ella undir hvørjum treytum tryggingin kann halda fram, tá:

**a)** farið verður undir at byggja á sama grundøki, at byggja afturat, ella størri umvælingar verða gjørdar (skal altíð verða góðkent av Betri Trygging).

**b)** bygningarnir skulu nýtast til annað endamál, enn í tryggingarskjalinum tilskilað.

**c)** bygningarnir fyri ein part ella burturav koma at standa mannleysir ella ónýttir.

**d)** innbúgvið veksur í virði, bæði við tað, at prísurin hækkar, og tí at nýtt innbúgv kemur afturat.

**e)** flutt verður bústað.

**270.02** Verður slíkt ikki fráboðað, kann tað sambært tryggingar-avtalulógini §§ 45 – 50 føra við sær, at rætturin til endurgjald verður avmarkaður, ella at endurgjaldið fellur burtur.

**270.03** Tryggingarfelagið hevur, tá ið tað verður kunnugt um nevndu broytingar, rætt til at broyta tryggingartreytirnar og -gjaldið beinanvegin.

**270.04** Verða bygningarnir ella nýtslan av teimum broytt so nógv, at ábyrgdin gerst so stór, at tryggingarfelagið – um tað visti av hesum frammanundan – ikki hevði góðkent, at ein trygging varð teknað, heldur endurgjaldsskylda felagsins uppat í somu stund, sum broytingin er gjørd.

# Innbústrygging

## 290.00 Trygdarásetingar

Eru ásett forboð og/ella krøv í tryggingarskjalinum, sum skulu vera hildin ella lokin, áðrenn skaðin hendir, til tess at fyribyrgja ella minka skaðan, og hevur tann tryggjaði ella onnur, ið hava skyldu at ansa eftir, at hesi krøv verða fylgd, ikki syrgt fyri hesum, hevur tann tryggjaði bert krøv móti Betri Trygging, um og tá prógvast kann, at skaðin ikki hendi ella gjørdist størri av tí, at hesi forboð og/ella krøv ikki eru hildin ella lokin. Sí tryggingaravtalulógina § 51.

## 300.00 Kríggj, náttúruvanlukkur o.tl.

**300.01** Tryggingin fevnir ikki um skaða ella útreiðslur av skaða, ið er ein beinleiðis ella óbeinleiðis fylgja av ella standa í sambandi við:

**a)** Kríggj, krígslíknandi viðurskifti, borgarakríggj, hendingar, ið standast av at gera seg inn á uttanveltað, uppreistur ella borgarligan ófrið. Á ferðum uttanlands er tryggingin kortini galdandi tann fyrsta mánaðin eftir at kríggj er brostið á, men einans um so er, at ósemjan ikki var byrjað, tá ið viðkomandi kom inn í landið.

**b)** NBCR-yvirgang (Nuclear, Biological, Chemical & Radiological) Við yvirgang er at skilja ein gerð/atgerð, íroknað - men ikki avmarkað til - brúk av makt og/ella harðskapi ella hóttan um, at makt og/ella harðskapur fer at vera nýttur, framd av einum ella fleiri persónum, uttan mun til um teir virka einsamallir ella í sambandi við ella í felag við ella vegna ein ella fleiri felagsskap/ir og/ella stjórnir og/ella myndugleikar, framd við politiskum, átrúnaðarligum, ideologiskum ella etniskum endamáli ella grundgeving, íroknað endamálinum at ávirka eina stjórn og/ella ein millumlandafelagsskap og/ella at skapa ótta í almenninginum ella parti av almenninginum.

Í hesum sambandi veitir Betri Trygging ikki endurgjald fyri NBCR-yvirgang ella sokallaðar dálkaðar bumbur:
Við dálkaðar bumbur er at skilja bumbur, rakettir o.tl. løddar við vanligum (konventionellum) spreingievni og dálkaðar við geislavirknum tilfari. Hesar bumbur verða vanliga nevndar dirty bombs. Sama er galdandi fyri bumbur, sum eru dálkaðar við evnafrøðiligum lívfrøðiligum ella bakteriufrøðiligum tilfari. Bumburnar gera skaða bæði við fysisku ávirkanini av sjálvum bumbubrestinum og við, at dálkað tilfar verður spjatt yvir eitt størri ella minni øki.

**c)** Jarðskjálvta ella aðrar náttúruvanlukkur. Á ferðum uttanlands er tryggingin eisini galdandi, um jarðskjálvti ella aðrar náttúruvanlukkur standast.

**d)** Hendingar, ið standast av atom– og kjarnorkuroyndum av einum og hvørjum slag, geislavirknum burturkasti, annaðhvørt slíkur skaði berst á í friðar– ella krígstíð.

**300.02** Skaði av kjarnorku til vanligt ídnaðarligt, lækna-frøðiligt ella vísindaligt endamál verður tó endurgoldin, um so er, at galdandi fyriskipanir hava verið fylgdar og ikki hava staðið í sambandi við reaktor– ella acceleratorvirksemi.

## 310.00 Viðlíkahald v.m.

**310.01** Um ein skaði fyri tað mesta stendst av, at tryggingar-takarin ikki hevur syrgt fyri neyðugum viðlíkahaldi, kann tryggingin nokta fyri at veita endurgjald.

**310.02** Sama er galdandi, um skaðin fyri tað mesta kemst av, at skeivleikar eru viðvíkjandi projektering, konstruktión, uppseting ella broti á byggisamtyktir, brunalóggávuna, sterkstreymslóggávuna, straffilóggávuna ella aðrar galdandi lógir og reglugerðir.

**310.03** Um Betri Trygging metir, at teir tryggjaðu lutirnir eru í ov vánaligum standi, ella at omanfyri nevndu lógir og fyri-skipanir ikki eru fylgdar, kann felagið strika tryggingina ella partar av henni.

## 320.00 Eftirlit

**320.01** Tryggingarfelagið hevur til eina og hvørja tíð rætt til at sýna teir tryggjaðu lutirnar til tess at meta um ábyrgdina, felagið átekur sær.

**320.02** Vísir eftirlitið, at tryggjaðu lutirnir eru serliga útsettir fyri ávísar skaðaorsøkir, kann felagið strika tryggingina ella partar av henni.

**320.03** Um so er, at tryggjaði noktar Betri Trygging at gera nevnda eftirlit, hevur Betri Trygging rætt til at strika tryggingina.

**330.00** Skaði, sum tann tryggjaði er atvoldin til við vilja ella í gáloysni.

# Innbústrygging

**330.01** Um tryggjaði við vilja ella av grovum ósketni hevur voldað skaðan, kann hann sambært tryggingaravtalulógini §§ 18–19 eftir umstøðunum missa rættin til endurgjald.

**330.02** Sama er galdandi, um skaðin er framdur av hjúnafelaga, ið livir saman við tryggjaða, sí trygging-aravtalulógina § 85.

**330.03** Hevur tryggjaði voldað skaðan av ósketni, ið ikki kann kallast grovt, ella í fyllskapi ella undir ávirkan av rúsandi ella doyvandi evnum, hevur tryggingarfelagið rætt til at avmarka endurgjaldið við upp til 5%, sí tryggingaravtalulógina § 20.

## 340.00 Dupulttrygging

**340.01** Eru somu lutir og áhugamál tryggjað ímóti sama vanda í øðrum felag, skal boðast Betri Trygging frá hesum, samstundis sum skaðin eisini skal boðast hinum felagnum.

**340.02** Hevur hitt felagið tikið fyrivarni um, at einki endurgjald verður latið, ella at hetta verður avmarkað, um so er, at trygging er teknað í meira enn einum felagi, eru somu fyrivarni galdandi fyri hesa trygging. Endurgjaldið verður tá at gjalda lutfalsliga av feløgunum.

## 350.00 Hvussu verður boðað frá skaða?

**350.01** Ein og hvør skaði skal beinanvegin skrivliga boðast til tryggingarfelagið. Er talan um innbrotstjóvarí, vanligt tjóvarí, herverk, rán ella álop, skal samstundis boðast løgregluni á staðnum frá, og kvittan fyri hesa fráboðan sendast Betri Trygging. Seinking kann hava til fylgju, at endurgjaldið verður avmarkað ella fellur burtur.

**350.02** Fráboðast skal beinleiðis til Betri Trygging.

**350.03** Eingin má fara undir at umvæla ella beina burtur skaddar lutir, uttan fyrst at hava fingið góðkenning um hetta frá tryggingarfelagnum.

**350.04** Hevur tann skaðarakti sett í verk umvælingar ella latið koyra burtur uttan loyvi frá tryggingarfelagnum, er hetta alt fyri hansara egnu rokning.

**350.05** Tað er neyðugt, at hin tryggjaði, tá ið boðað verður frá innbroti, kann gera sannlíkt, at tjóvarí er framt.

## 360.00 Bjarging og varðveitsla

**360.01** Hin tryggjaði skal, tá ið skaði er hendur ella ein skaði er um at taka seg upp – eftir besta førimuni – avmarka ella fyribyrgja skaðan.

**360.02** Betri Trygging letur rímiligt endurgjald fyri at seta í verk arbeiði at forða fyri einum skaða sum omanfyri nevnt.

## 370.00 Ósemjur

**370.01** Eru viðurskifti við felagið, ið tryggingartakarin er ónøgdur við, er hann vælkomin til, í fyrsta umfari, at seta seg í samband við okkum aftur. Vanliga mannagongdin er, at hann setir seg í samband við ta deildina, hann er ósamdur við.

**370.02** Talan kann vera um ymisk viðurskifti, t.d. í sambandi við, at trygging verður teknað, í sambandi við eina skaðaavgreiðslu ella onnur viðurskifti við felagið.

**370.03** Kann málið verða loyst á henda hátt, er tað tann besta, mest einfalda og skjótasta loysnin fyri báðar partar.

**370.04** Um semja ikki fæst, eru tríggir møguleikar at fara víðari við málinum, sí §§ 371.00 - 373.00.

## 371.00 Innanhýsis kæruviðgerin hjá Betri Trygging P/F

**371.01** Kærast kann til innanhýsis kæruviðgeran hjá Betri Trygging.

**371.02** Kæran skal sendast skrivliga til felagið. Tað skal í skrivinum vera greitt, at talan er um kæru til kæruviðgeran. Kæran kann sendast við vanligum brævi ella við teldubrævi.

**371.03** Í kæruni skal greiðast frá, hvat tað er, sum ósemjan snýr seg um. Tað er ikki neyðugt at leggja tað samskiftið við, sum er farið fram skrivliga við tryggingarfelagið, men nýggj sjónarmið kunnu førast fram í kæruni.

**371.04** Kæran skal, tá talan er um vanligan post, sendast til:
Betri Trygging P/F
Kæruviðgerin
Kongabrúgvin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn
ella við teldubrævi til: betri@trygging.fo
Teldubrævið skal stílast til kæruviðgeran.

# Innbústrygging

## 372.00 Kærunevndin

**372.01** Kærast kann beinleiðis til donsku kærunevndina, uttan fyrst at kæra til innanhýsis kæruviðgeran.

**372.02** Skrivlig kæra – skrivað á donskum – skal sendast kærunevndini, saman við ávísum gjaldi. Um tryggingartakarin, heilt ella partvíst fær viðhald í kæruni, verður gjaldið afturrindað.

**372.03** Á heimasíðuni hjá Ankenævnet for Forsikring er frágreiðing um, hvussu farast skal fram, tá kært verður.
Sí: http://www.ankeforsikring.dk

**372.04** Um ivamál eru viðvíkjandi, hvussu kært verður til Ankenævnet for Forsikring, sendir felagið eftir umbøn oyðublað og faldara hesum viðvíkjandi. Felagið er til reiðar við hjálp og vegleiðing viðvíkjandi kæruni.

**372.05** Kæran skal sendast til:
Ankenævnet for Forsikring
Anker Heegaardsgade 2
Postbox 360
1572 København V.
Tlf. nr.: 0045 33 15 89 00
Fax nr.: 0045 33 15 89 10

## 373.00 Yvirsýn

**373.01** Er tvídráttur um skaðauppgerðina, kunnu tryggingartakarin og tryggingarfelagið avtala at lata skaðauppgerðina avgera av óheftum metingarmonnum.

**373.02** Metingarmennirnir skulu, áðrenn teir fara til verka, velja ein uppmann, sum eisini skal vera óheftur. Koma teir ikki ásamt um uppmann, velur Sorinskrivarin hann.

**373.03** Metingarmennirnir gera uppgerðina í neyvum samstarvi við ásetingarnar í tryggingartreytunum og – skjalinum og gera eina skrivliga frágreiðing um, hvussu teir hava gjørt tapið upp.

**373.04** Yvirsýnið er endaligt og bindandi fyri báðar partar.

Koma metingarmennirnir ikki ásamt um skaðauppgerðina, er tað uppmaðurin, ið innan fyri rammurnar av tí, ið metingarmennirnir eru komnir til, skal gera úrskurð í málinum. Avgerð hansara er tá endalig og bindandi fyri báðar partar. Metingarmennirnir avgera somuleiðis, hvussu kostnaðurin av yvirsýninum verður at býta millum partarnar.